# Trong kor hjá bókaútgávu

**Upplestur, ein nýggj orðabók og áhugavert kjak um korini hjá bókaútgávu í Føroyum settu dám á árliga bókadagin, sum rithøvundafelagið og Norðurlandahúsið skipaðu fyri í gjár**

BÓKADAGUR 2005

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Árligi bókadagurin, sum var hildin í Norðurlandahúsinum í gjár, var enn einaferð dømi um, at tað er idealisma heldur enn vanligt vit og skil, sum fær fólk at orka at fáast við at geva bøkur út í Føroyum. Á pallborðsfundinum var breið semja um, at umstøðurnar hjá bókaútgávu í Føroyum ofta eru ósømiliga trongar, men kortini hava útgávurnar í ár verið bæði nógvar og fjølbroyttar. Harumframt sá eitt megnar orðabókaverk eisini dagsins ljós hetta bókaárið.



*Tað var ein sera fegin Dávur Jacobsen, sum í gjár legði fram nýggju íslendsku-føroysku orðabókina eftir íslendingin og føroyavinin Jón Hilmar Magnussen*

## Trong kor

Á pallborðsfundinum um korini hjá bókaútgávu í Føroyum stóðst kjakið mest um, hvørt bókaútgáva skal verða alment stuðlað, og í hvønn mun stuðulin, sum verður latin, er kappingaravlagandi. Helena Dam á Neystabø, sum umboðaði Føroya skúlabókagrunn, legði áherðslu á, at heldur enn at illneitast inn á hvørt annað, áttu bókaforløg í Føroyum í felag roynt at arbeitt fyri, at bókaútgáva sum heild fekk størri peningaupphæddir at arbeiða við.

Í løtuni sær tað út til, at tað bert eru barna- ungdóms- og skúlabókaútgávur, sum so dánt hóra undan fíggjarliga, meðan fagurfrøðiliga økið til vaksin er við skerdan lut. Ein orsøk kann vera, helt Justinus Eidesgaard, at ein grunnur sum Mentanargrunnur Landsins hevur alt ov nógv ymisk øki at varða av. Hann sá fyri sær ein munagóðan grunn, sum hevði til uppgávu at fíggja bókaútgávur og onki annað. Í sama viðfangi nevndi hann, at í staðin fyri at tøva í sama gamla grenjinum um, at føroyski bókamarknaðurin er so lítil, áttu vit eisini at vent eyguni úteftir og lagt okkum eftir at stuðla týðingum fyri á tann hátt at víðka um marknaðin.

## Ótroyttiligt arbeiði

At bókaútgávur í Føroyum ofta eru úrslit av óvanligum eldhuga heldur enn umstøðum, var nýggja Íslendska-Føroyska eitt gott dømi um. Eftir meir enn 10 ára arbeiði og mest at kalla uttan fíggjarligan stuðul, var løtan umsíðir komin í gjár, tá hetta stóra verkið kundi leggjast fram alment. Tað er íslendingurin og føroyavinurin Jón Hilmar Magnussen, sum hevur gjørt bókina, men uttan ótroyttiliga arbeiðið hjá vinmanninum Dáva Jacobsen at fáa hana rættlisna, hevði hon neyvan verðið veruleiki.




*Í steðginum á bókadegnum spældu Petur Pólson og vinmenn løg av fløguni "Koma", sum Petur gav út herfyri*



*Við pallborðið var breið semja um, at tað ofta er idealisma heldur enn umstøðurnar, sum ger, at føroysk bókaútgáva ikki heilt er dottin niðurfyri*




VINNUHÚSIÐ
House of Industry

## Starvslesandi í Vinnuhúsinum

Við hesum verður søkt eftir starvslesandi til Vinnuhúsið fyrra hálvár 2006. Lesandi kunnu søkja um at koma í starvsvenjing, um tey t.d. hava áhuga í at kunna seg um ávíst vinnuøki í samband við lestraruppgávu ella í samband við teirra lestrarøki sum heild.

**Uppgávur**
Tann starvslesandi fær eina høvuðsuppgávu at loysa, sum er tengd at fakligu bakgrundini hjá viðkomandi og tørvinum hjá Vinnuhúsinum. Dømi um eina tílíka uppgávu er at gera kunningartilfar til heimasíðuna, kanna marknaðir, skriva frágreiðing um altjóða rák, gera greiningar av eini vinnugrein ella líknandi. Harafturat kemur tann starvslesandi luttaka í dagliga arbeiðnum í Vinnuhúsinum.

**Førleikakrøv**
Tann starvslesandi eigur at vera lesandi við hægri háskúla og skal í minsta lagi hava lokið útbúgving á bachelor stigi.

Tey, ið søkja, eiga at hava góð samstarvsevni, vera ágrýtin, miðvís, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar eiga umframt hetta at vera stinnir í føroyskum og enskum máli.

**Setanartreytir**
Starvið er skipað eftir somu reglum, ið eru galdandi fyri starvslesandi hjá tí almenna og er ólønt. Viðbót verður tó latin eftir nøktandi uppihald. Møguleiki er at søkja um ferðastuðul frá Stuðulsstovninum. Stuðul verður veittur til bústaðarútreiðslur.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jan Mortensen ella Maritu Rasmussen, tlf. 309900. Meira kunning um Vinnuhúsið er at finna á www.industry.fo

Umsókn við prógvum og/ella avriti av úrslitum higartil skal sendast til:

Vinnuhúsið
Postboks 1038,
FO-110 Tórshavn

Ella við telduposti til: industry@industry.fo

Umsóknarfreistin er 9. januar 2006.

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 15 vinnufeløgum. Í løtuni starvast 6 fólk í umsitingini. Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møguligu kor. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

Smærugøta 9A, FO-100 Tórshavn
Tel 30 99 00, Fax 30 99 01
industry@industry.fo, www.industry.fo

www.sansir.fo